

www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 03 - 2012

# Forstjórin í Dong farin frá

Rættiliga óvæntað er forstjórin í Dong Energy tey seinastu 11 árini, Anders Eldrup, brádliga farin frá. Í einari stuttari fráboðan seinnapartin skrivar nevndarformaðurin Fritz Schur, at Anders Eldrup hevur gjørt eitt stórt arbeiði fyri fyritøkuna, sum er sterk og væl rikin. Formaðurin leggur afturat, at leiðslubroytingin fær onga ávirkan á raksturin ella framtíðarætlanirnar hjá felagnum. Illgruni um oyðsl Sambært donskum greinarum er tað kortini neyvan av tilvild, at Anders Eldrup fer frá júst nú. Eitt er, at 2011-roknskapurin, sum felagið legði fram fyri nøkrum døgum síðani, vísti eitt munandi minni avlop enn árið fyri, og eitt annað áhugavert í hesum sambandi er, at Ríkisgrannskoðanin kannar, um leiðslan í Dong hevur oyðslað við felagsins pengum. -Vit hava fingið upplýsingar um, at Dong fer rættiliga lætt um felagsins útreiðslur, ella at felagið brúkar meiri, enn gott er, segði formaðurin hjá Ríkisgrannskoðarunum, Peder Larsen, við JyllandsPostin í síðstu viku. Dong hevur víst ábreiðslunum aftur. Tøgn um orsøkina Í fráboðanini seinnapartin sigur Fritz Schur ikki eitt orð um, hví Anders Eldrup fer frá. Fyribils skal fíggjarstjórin, Carsten Krogsgaard Thomsen, røkja forstjórastarvið, men arbeiðið at finna ein annan forstjóra er longu byrjað. Anders Eldrup fer tó ikki tómhentur úr stjórastarvinum í Dong Energy. Sambært donskum fjølmiðlum hevur hann eina fráfaringaravtalu, sum tryggjar honum 17 milliónir krónur í samsýning, nú hann fer frá. Danski staturin eigur meirilutan í Dong, og áðrenn hann bleiv forstjóri í felagnum, var Anders Eldrup stjóri í fíggjarmálaráðnum.

